# – Vit standa veikari sum tvey kommunufeløg

**– Eg kundi hugsað mær at tær størru og tær smærru kommunurnar nærkaðust hvørjum øðrum. At vit eru tveir felagsskapir ger okkum ikki sterkari, sigur nýggi formaðurin í Kommunusamskipanini, Rodmundur Nielsen**



*Jógvan Krosslá handar lyklarnar til skrivstovuna hjá Kommunusamskipanini til nýggja formannin, Rodmund Nielsen. - Tað verður trupult at útfylla títt engasjement í felagsskapinum, segði Rodmundur á samkomuni fyrrapartin í gjár*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

KOMMUNU-POLITIKKUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Tað var ikki tann stóri dramatikkurin í luftini, tá Kommunusamskipan Føroya fyrrapartin í gjár fekk nýggjan formann.

Jógvan Krosslá úr Vági hevur sitið sum formaður seinastu fýra árini men kundi ikki halda fram í hesum starvi. Orsøkin til hetta er tann einfalda, at hann ikki longur ber heitið sum borgarstjóri í heimbygdini longur.

Á samkomu í húsum felagsins kundi hann tí handa lyklarnar til skrivstovuna til eftirmann sín, Rodmund Nielsen, sum hevur tikið við enn eina setu sum borgarstjóri í Runavíkar Kommunu.

Kommunusamskipan Føroya – stytt: KSF – er felagið hjá teimum stóru kommununum, og umboðar í løtuni góðar 2/3 av øllum íbúgvunum í landinum. Í felagsskapinum eru kommunurnar í Vági, Tvøroyri, Havn, Runavík, Fuglafirði og Klaksvík.



*- Munur er á felagsskapunum hjá teimum størru og teimum smærru kommunum. Men at vit í dag eru tvey, ger okkum ikki sterkari, men heldur veikari mótvegis landsins myndugleikum, sigur Rodmundur Nielsen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Stórar, men líkar

– Stutt sagt, so er okkara uppgáva í KSF at røkja felags áhugamál hjá hesum seks stóru kommununum í Føroyum.

– Hesar kommunurnar eru uppá mangar mátar rættiliga líkar, og standa tí eisini við eini felags støðu mótvegis myndugleikunum, sigur Rodmundur Nielsen.

Hesi seinnu árini hava landsins myndugleikar lagt alt fleiri og fleiri uppgávur út á kommunurnar at umsita, og her er neyðugt at bæði tær størru, men eisini tær smærru kommunurnar, arbeiða saman.

Í løtuni er støðan tann, at tær størru kommunurnar eru í einum felagsskapi, meðan tær smærru eru í Kommunufelagnum. Hetta er eitt mál, sum Rodmundur Nielsen er upptikin av.

– Eg kundi væl hugsað mær at hesi báðir felagsskapirnir nærkaðust hvørjum øðrum.

– Sjálvandi er munur á báðum, men at vit í dag eru tvey, ger okkum ikki sterkari, men heldur veikari mótvegis landsins myndugleikum, sigur hann avgjørdur.

Nú, hann hevur tikið við formanssessinum í KSF, er tað við sannføringini um, at hann hevur við ein væl skipaðan og seriøsan felagsskap at gera. Skrivstovan er væl skipað við aðalskrivaranum, Ingibjørg Berg á odda, umframt annað starvsfólk.

– Jú, eg gleði meg til hesa uppgávuna, sigur Rodmundur Nielsen, sum frammanundan hevur sitið sum borgarstjóri í Runavíkar Kommunu seinastu fýra árini.

## Engasjement

Seinastu fýra árini hevur borgarstjórin í Vági, Jógvan Krosslá sitið sum formaður í Kommunusamskipanini. Eftir býráðsvalið í heyst varð samgongan skipað við øðrum formanni, og tí kundi hann ikki veljast aftur til hetta ábyrgdarstarvið.

Á fundinum fyrrapartin í gjár nýtti hann høvi til at heilsa nýggja formanninum, samstundis sum hann ynskti honum blíðan byrð framyvir.

– Eg veit, at Kommunusamskipanin verður væl stýrd í tínum hondum, segði Jógvan Krosslá, áðrenn hann handaði Rodmundi lyklarnar til skrivstovuna.

Rodmundur Nielsen nýtti í sama viðfangi høvið at takka Jógvani Krosslá fyri sítt arbeiði í KSF tey seinastu fýra árini. Hesum felagsskapi hava allar kommunurnar notið gott av.

– Tað hevur verið sera spennandi at arbeiða saman við Jógvani, sum hevur drúgvar royndir í kommunalum politikki. Hetta hevur verið bæði læruríkt og spennandi fyri meg, segði hann, og staðfesti í sama andadrátti:

– Hinvegin verður tað trupult at útfylla títt engasjement í felagsskapinum. Tú hevur veruliga offrað teg, og ert komin norður um Suðuroyarfjørð í øllum veðri, fyri bert eitt hálvttalað orð!

## FAKTA

### um Kommunusamskipan Føroya

- KSF er felag hjá føroyskum kommunum, og umboðar 66,3 % av íbúgvunum í Føroyum
- Limakommunur eru: Klaksvík, Fuglafjørður, Runavík, Tórshavn, Tvøroyri og Vágur
- Endamálið er at virka fyri felags áhugamálum og størri kommunalum sjálvræði.
- KSF samskiftir og samstarvar við landsumsitingina, vinnulívið, feløg og felagsskapir í Føroyum og uttanlands. Tað umboðar limakommunurnar í málum av felags áhuga.
- KSF er skipað við einum stýri, ið tekur avgerðir, einum starvsbólki, ið fyrireikar mál til stýrið og eini skrivstovu, ið samskipar virksemi og útinnur avgerðirnar hjá stýrinum
- Nývaldur formaður er Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavíkar Kommunu.
- Aðalskrivari er Ingibjørg Berg